## Øssur á Sct Gertrud

Leygardagin letur føroyski listamálarin, Øssur Mohr, upp framsýning á Galleri Sct Gertrud í Keypmannahavn.

Framsýningin verður hildin á Galleri Sct Gertrud, sum er at finna á Hyskenstræde, sum er at finna miðskeiðis í danska høvuðsstaðnum.

Á ferniseringini, sum verður leygardagin, fer Stanley Samuelsen eisini at framføra nøkur løg, so vónandi verður talan um eina hugnaliga løtu hjá teimum, sum hava leitað sær á staðið.

Framsýningin er opin til 4. mars.

**-mørk**

# Kórferð við Havnarkórinum

**Havnarkórið hevur konsert í Argja Skúla hóskvøldið**

KONSERT
*tíðindaskriv*



*Havnarkórið fer at hava konsertir kring alt landið í ár*

Nú fjøruti ár eru liðin, síðan Havnarkórið byrjaði sítt virksemi, hevur kórið sett sær fyri at hava konsertir víða um í landinum í hesum ári. Fyrsta konsertin var jubileumskonsertin seinasta leygardag. Henda konsertin verður nú í nakað broyttum líki tikin uppaftur í Argja Skúla í kvøld / í annaðkvøld.

Á skránni eru kórsatsir hjá nútíðar føroyskum tónasetarum sum Kára Bæk, Bjarna Restorff, Paula í Sandagerði og Sunleifi Rasmussen. Á føroyskum eru eisini kórsatsir eftir danska tónaskaldið Vagn Holmboe til úrvaldar yrkingar hjá J.H.O. Djurhuus umframt ørindir úr Sigmundskvæðnum yngra, sum V. Holmboe skipaði fyri blandað kór.

Seinni partur av skránni fevnir um europeiskan kórtónleik: kórperlur eftir John Bennet, Giuseppe Verdi, Johs. Brahms, Sergei Rachmaninov og Kaspar Bachofen. Konsertin endar við broti úr Skapanini eftir Joseph Haydn, har Petur Niclasen syngur resitativið og Jóhannes Andreasen hevur klaverfylgispælið.

Ókeypis atgongd er til konsertina, sum er ókeypis.


# Umboðsráðsval 2006

## Valúrslit Fyri Umboðsráðið í Ognarfelag Tryggingartakaranna

**Tey 12 nývaldu umboðsráðslimirnir eru:**

Andrias Ziska, Varðabrekka 3, Tórshavn
Anthonius Dalsgaard, Mækjugøta 5, Tórshavn
Birgir Mohr, Sandur
Egon Hansen, Fútalág 14, Tórshavn
Jákup Suni Lauritsen, Sørvágur
Jan Müller, Sleipnisgøta 10 Tórshavn
Jógvan Lützen, Stoksoyravegur 3, Klaksvík
Jónsvein Knudsen, Á Heygnum 7, Saltangará
Mamy Dahl Sørensen, Viðareiði
Páll Petersen, Á Smið, Kaldbak
Regin Hammer, Hanusargøta 7, Tórshavn
Schandorff Vang, Oyrarbakki

**Valskeið**

Valið er galdandi í fýra ár og valskeiðið er at rokna frá d.d.

Víst verður til lýsing í bløðunum um miðjan januar um val til umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna.

Tórshavn, 3. februar 2006
**Ognarfelag Tryggingartakaranna**
**Stjórnin**

www.samsir.fo

OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA
Kongabrúgvin · Postboks 329 · FO-110 Tórshavn
Tel 345600 · Fax 345601 · tf@trygging.fo · www.trygging.fo


# SIC í Grand Prixnum



*Frans og Mikkjal úr bólkinum SIC*

**Føroya harðasti og tyngsti rokkbólkur SIC fer fríggjakvøldið at kappast við bestu donsku bólkarnar innan teirra tónleikagrein. Hetta er eitt høvi hjá teimum at vísa seg fyri danska tónleikaídnaðinum**

TÓNLEIKAKAPPING
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Føroysku tungmálmsrokkararnir í SIC verða millum teir 20 bólkarnar, ið skulu kappast í danska málms prixnum, Danish Metal Grand Prix. Sic luttekur í undanumfarinum í Aalborg nú fríggjakvøldið 10. februar.

Konsertin verður á Café 1000 fryd. Í undanumfarinum skal Sic kappast við bólkar við løgnum nøvnum sum: Croan, Like Sycodellic Disbelief, Broadmoor , Evil Live og Svartsot.

Umframt umfarið í Aalborg eru undanumfør í Aarhus og Keypmannahavn. Finalan verður í Aalborg fríggjadagin 17. februar. Tó er ikki heilt greitt hvør virðislønin verður. Upprunaliga var hon 3 dagar í upptøkuhøli, umfamt luttøka á ársins Midtfynsfestivali, men í gjár varð hesin festivalur avlýstur. Um onkur onnur konsert verður ístaðin er enn ikki greitt.

Sic hava langt síðan sligið navn sítt fast, sum besti føroyski tung-, rusk- og deyðsmálmsbólkurin. Hetta varð enn einaferð váttað, tá teir gjørdust nummar trý í føroysku GBOB finaluni. Fríggjakvøldið sleppa teir so at royna seg ímóti danska málmspallinum. Avgerðin um hvør vinnur verður tikin av einum blandi av dómarum og áskoðarum. Dómararnir eru serkøn úr tónleikaídnaðinum.